# Donsk poppveitsla við biti



*Ljóðið er teirra egna, og tú hoyrir við eitt, at talan er um Alphabeat. Tað er ikki slóðbrótandi, men teirra egna*

**Hóast tey ongantíð komu ordiliga út um pallkantin, so borðreiddu donsku Alphabeat við eini spennandi og dygdargóðari poppveitslu**

SUMMARFESTIVALUR
*Petur Háberg*
*petur@sosialurin.fo*

Tey flestu minnast lagnuna hjá Summar Festivalinum í fjør. Alt fekk ein bráðan enda, tá ið eitt ódnarveður tók alt við sær á flog og elvdi til stórar skaðar.

Í ár var veðrið gott bæði hósdagin og fríggjadagin, og alt gekk sum ætlað. Men veðurforsøgnirnar fyri leygardagin vóru ikki góðar, og tí varð valt at binda um heilan fingur. Tíðliga seinnapartin varð nýggj skrá kunngjørd, og ein av broytingunum var, at framførslan hjá Alphabeat varð framskunda frá klokkan hálvgun tólv um kvøldið til klokkan fimm seinnapart.

Eftir eina stutta innleiðing frá Sjúrða Skaale, ið annars dugdi væl at vera vertur á Stóra Palli, komu tey seks ungu fólkini á pall. Og ein fann skjótt út av, hví danska sekstettin hevur tikið enska tónleikaheimin við stormi.

## Bit ella tannleyst?

Poppur er ofta eitt sindur tryggur og lættur at lesa av. Tær nýtist bara at hoyra fyrstu regluna í einum niðurlagi, og tú dugir restina. Sum ein partur av Hortonsagaðini. Og soleiðis var tað til dømis við framførsluni hjá Melanie C fríggjakvøldið. Framførslan var góð, men einki serliga spennandi. Løgini vóru eftir bókini og álík løgum, ið ein hevur hoyrt fyrr.

Alphabeat spælir eisini popp, men við biti. Hóast løgini eru lurtaravinarlig, so hava tey ein kant og eru kryddað við áhugaverdum elementum. Ljóðið er teirra egna, og tú hoyrir við eitt, at talan er um Alphabeat. Tað er ikki slóðbrótandi, men teirra egna.

## Innaftur við 80'unum

Tí var tað ein fragd at standa á Vágsbøi leygardagin og lurta. Umframt hittini 'Boyfriend', 'Fascination' og '10.000 Nights of Thunder' vóru eisini fleiri onnur góð og sterk løg, ið ikki stóðu aftanfyri hesi trý. Serliga løgini 'Go Go' og 'Rubberboots', ið vórðu míni hæddarpunkt.

Tónleikurin kann lýsast sum melodiskur poppur við íblástri úr 80'unum. Onkuntíð leiddu tey tankarnar til 80'ara funk-bólkin Level 42, onkuntíð til okkurt gamalt hjá Depeche Mode. Men allatíð var tíð í einum nútímans og uppdateraðum hami. Tónlistarliga kann eg ikki seta fingurin á nakað stórvegis.

## Knirkandi samskifti

Ungu silkeborgensararnir, ið øll eru í tjúgunum, høvdu yvirskot og sóu út til at hugna sær. Serliga forsangarin, Anders NG, dansaði sum eitt ótt á pallinum og sleði so hart á sína tamburin, at man skuldi trúð, hon hevði gjørt honum okkurt.

Men allíkavæl komu tey ongantíð út um pallkantin, so at siga. Føroyingar eru kanska ikki nemmasta fólkaslag at hava við at gera á júst hesum økinum, men tað er gjørt fyrr, og fleiri onnur nøvn á ársins festivali høvdu gott tak á áhoyrarafjøldini. Júst hvat manglaði, er torført at siga. Kanska var tað ov tíðliga á degnum. Kanska var pallurin ov langt frá áhoyrarfjøldini. Kanska dugdu tey ikki við føroysku áhoyrarafjøldini (ella umvent!). Men talan var ongantíð um ta stóru synergi'ina.

Men fyri mítt viðkomandi bilti hetta ikki. Eg var komin fyri at lurta eftir tónleiki. Ikki til ein fyrilestur ella parterapi, men til eina konsert. Og tað fekk eg eisini – eina av teimum heilt góðu!

# Fúla sangløtan

**At føroyingar vakna um náttina sást týðiliga í fríggjanáttina, tá ið Páll Finnur Páll endaðu festivaldagin. So at siga øll sungu við, tá ið fúlu sangirnir rungaðu út í náttina**

SUMMARFESTIVALUR
*Petur Háberg*
*petur@sosialurin.fo*

Linda Andrews nevndi á pallinum ígjár, at tað var eitt sindur súrt, at tað ikki var fyrr enn nakrar øl vórðu komnar niðurum og tað var vorðið myrkt, at føroyingar slóu seg leysar. Um tað er so, veit eg ikki, men í nátt var hýrurin í toppi, tá ið Páll Finnur Páll spældu fyri einum nærum fullum FLAGS-tjaldi.

Løgini hjá PFP eru løtt. Melodiirnir fangandi. Tekstirnir fúlir. Hesi eru nøkur av tingunum, ið gjørdu, at næstan hvørt einasta menniskja í FLAGS-tjaldinum sang við til sangir sum ´Mín russiski vinur´, ´Herbergið´, ´Dýr tíð´, ´Havsins ríki´ og ´Viðurkenning´. Og í væl meiri enn ein tíma sungu fólk við, meðan onnur dansaðu.

At enda, tá ið bólkurin varð klappaður upp aftur, bjóðaðu teir Faroe 5 á pallin, har tær hjálptu Finnuri og Páll Odduri at syngja ´Herbergið´. Frískt trekk.

Beint áðrenn fýratíðina varð síðsti tónin spældur, og farið varð út í dimmalættingina.



# Børnini elska Angelu og Hannibal

**Angela og Hannibal spældu seg aftur leygardagin í hjørtuni hjá børnunum, tá figurarnir, vit kenna frá sjónvarpinum, framførdu á Torginum**

SUMMARFESTIVALUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

Børnini elska Angelu og Hannibal. Tað var aftur staðfest í Klaksvík leygardagin, tá hesi framførdu á Torginum. Tað var stuttligt at síggja, hvussu børnini livdu seg inn í leikin. Kúllurin Hannibal royndi fleiri ferðir at snýta Angelu, men hvørja ferð talaðu børnini at og avdúkaðu Hannibal.

Leikurin riggaði væl, og áhoyrararnir kendu seg sum ein part av framførsluni. Tey settu í heilum spurningar til børnini, umframt, at ein genta slapp upp á pallin, har hon skuldi ganda hárið hjá Hannibal.

Børn hava veruliga tikið Angelu og Hannibal til sín, eingin ivi um tað.